# HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

DL Málnr.: 200900412-2

# Hissini søla av matvørum

## Hissini søla av matvørum er at skilja sum:

Søla av matvørum í **eitt avmarkað tíðarskeið**, so sum til stevnur, samkomur, innan- og uttandura tiltøk ella søla av matvørum einstakar dagar í sambandi við eitt hvørt endamál.

Allur **matur skal koma frá góðkendum stað**.

Tiltakið kann fara fram 1 til 2 ferðir um árið, við eini longd uppá 1-2 vikur í alt.

**Tá rátt kjøt skal tilgerast, skal Heilsufrøðiliga starvsstovan hava fráboðan.**

Fylgjandi nevndu treytir **eru minstu krøv,** sum skulu fylgjast, tá talan er um **hissini sølu** av matvørum**.**

**Matvørur, klárar hja viðskiftafólki at eta:**

- Alt skal verða gjørt ella tilgjørt á góðkendum stað, og skal **ikki** koma úr privata køkinum.
- Matur og drykkir skulun útbjóðast úr reinum eingangsíløtum.
- Pylsur, burgarar, kjøt o.a. frysti- ella kuldavørur skulu goymast kalt, tvs. niðan fyri 5° C, til tær verða hitaviðgjørdar og útbjóðaðar.
- Pylsur, suppur, kakao o.a. vørur, ið skulu goymast heitt, skulu haldast heitar við minst 65° C, til tær verða útbjóðaðar.
- Vaflu- og pannukøkudeiggj skal haldast kalt, tvs. niðanfyri 5° C, til bakað og útbjóðað verður.
- Smyrjibreyð, tvíflísar (sandwich), rómakøkur o.t. skal goymast kalt, tvs. niðan fyri 5° C, til tað verður útbjóðað.
- Matvørur, seldar til at eta beinanvegin kunnu standa uttan køling í mesta lagi 3 tímar. Restir av tilfari ella lidnum matvørum, sum hava staði uttan køling í meiri enn 3 tímar, skulu burturbeinast.
- Aftaná loknan arbeiðsdag skulu allar matvørur, sum eru tilgjørdar og klárar at eta, beinast burtur.

**Fiskur, sjómatur ella annað líknandi, sum krevur viðgerð, áðrenn tað verður etið:**

- Fiskurin (maturin) skal alla tíðina vera ísaður, ella liggja á køl.
- Sølan skal vera frá innilokaðum bili, bási ella líknandi.
- Hóskandi ruskskipan skal vera. Eftir loknan arbeiðsdag skal alt í sambandi við søluna beinast burtur, og staðið skal um neyðugt vaskast.

**Almenn krøv:**

- Ruddiligt og sjónliga reint skal vera har, ið matvørurnar verða tilvirkaðar og útbjóðaðar.
- Hondvask við rennandi vatni, flótandi sápu og eingangshandklæði og ruskspann, skal vera. Møguleiki skal vera at vaska upp í heitum vatni.
- Starvsfólkini skulu hava atgongd til vesi **(sum ikki er alment vesi).**
- Starvsfólkini skulu vera í hóskandi arbeiðsbúna.
- Hóskandi ruskílat skal vera á staðnum, og ruskið skal javnan beinast burtur frá økinum.

Mint verður annars á §11 í matvørulógini, nr. 46/1985, sum sigur:

*"forboð er fyri sølu av matvørum, um tær, nýttar á vanligan hátt, kunnu ætlast at bera ella vera atvoldin til sjúku, ella kunnu hava eitran sum fylgju, ella um matvørurnar vegna sjúkligar broytingar, spillu, dálkingarevni, skeiva virking ella av aðrari orsøk kunnu ætlast at vera óegnaðar til fólkamat".*